# HF skipar fyri rútmukapping

**Um júst ein mánað skipar Havnar Fimleikafelag fyri rútmukapping**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Havnar Fimleikafelagið skipar tann 19. januar fyri innanhýsis fimleikakapping.

Talan er um sonevnda rútmukapping, og er hetta ein kapping, sum er opin fyri øllum limum felagsins, tó treytað av, at hesi eru úr 3. flokki og eldri.

Kappingin verður býtt í 3 bólkar: »3. til og við 4. flokkur«, »5. til og við 6. flokkur« og »7. flokkur og eldri«. Eru luttakarar á sama liði í tveimum ymsum bólkum, t.d. soleiðis: Tvær ganga í 4. flokki og tríggjar ganga í 5. flokki skulu tær í bólk 2 (meðan lið har 5 gentur ganga í 4. flokki sjálvsagt fer í bólk 1). Luttakararnir kunnu væl luttaka í fleiri liðum.

Tað stendur liðunum frítt at velja, hvussu fimleikaserian skal síggja út, men dømt verður eftir kroppsburði, hvussu tryggar genturnar eru í venjingunum, samsvar millum tónleik og venjingar og hvussu genturnar fylgjast í íðkanunum.

# Seinasti bruttohópurin

**Lars Nedergaard hevur nú tikið 17 leikarar út til bruttohópin hjá hondbóltslandsliðnu m. Teirra millum Tróndur Joensen og Mads T. Jensen**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mads T. Jensen er higartil eitt fullkomuliga ókent navn í føroyskum manshondbólti, men hann er so millum tey 17 nøvnini, sum eru í seinasta bruttohópinum hjá landsliðsvenjaranum, Lars Nedergaard.

Talan er her um ein av liðfeløgunum hjá Jens á Skipagøtu og Trónda Joensen í Team Amager. Tað hevur víst seg, at leikarin hevur føroyska ætt, og tí hevur møguleika at spæla á føroyska landsliðnum.

– Enn er hópurin ikki endaliga úttikin, men vit hava valt at hyggja nærri at leikaranum, sum vanliga spælir á vinstra veingi, og annars er hampuliga væl fyri, sigur Hjalmar Klein Olsen, hjálparvenjari hjá landsliðnum.

– Vit kunnu bara staðfesti, at lámir eru ein mangulvøra hjá okkum, og tí gjørdi vit av at taka av, tá hetta soleiðis mest sum av tilvild stóð okkum í boði, sigur Hjalmar.

Savnanin av bruttohópinum hesaferð er annars seinasta finpussingin í fyrireikingunum til komandi undankappingardystirnar hjá A-landsliðnum. sum tað framgongur av yvirlitinum, so er her talan um 17 leikarar, men tollaksmessudag verður hetta skorið niður í 15.

Annars er vert at bíta merki í, at Tróndur Joensen nú aftur er tøkur hjá landsliðnum. Fyrrverandi kyndils-leikarin hevur av ymsum ávum ikki havt stundir til landsliðið higartil, men nú sær betri út í so máta, og væntandi kann hann gerast ein góður styrkur at hava hjá liðnum.

## Føroyski brutthópurin

| | |
|---|---|
| Jens á Skipagøtu | Team Amager |
| Eli Müller | VÍF |
| Jóhan L. Danielsen | Kyndil |
| Sveinur Justinussen | StÍF |
| Áki Olsen | VÍF |
| Bárður Brimvík | H71 |
| Tróndur Joensen | Team Amager |
| John Zachariasen | VÍF |
| Halgir Dahl Olesen | H71 |
| Ingi Olsen | VÍF |
| Heini H. Joensen | GV Ejby |
| Janus Einar Sørensen | Kyndil |
| Martin Hummeland | Ajax/Farum |
| Áki G. Olsen | VÍF |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil |
| Mads T. Jensen | Team Amager |
| Høgni Klein | Kyndil |


...nýtið bussin!



Lít teg um, meðan Bygdaleiðir koyra teg vestur. Siggj Skælingskarð í Streymoy og ver løtu seinni bergtikin av Breiðastíggi vágamegin. Og unnir tú eisini umhvørvinum okkurt, er busstúrurin bara ein ókeypis og síðmennandi síðuvinningur, sum Bygdaleiðir bjóða.

Alt hetta fært tú, meðan strongdir bilførarar í tíðarneyð hvør í sínum lagi skifta gír og síðu, spíta upp og blinda niður, viska og venda sær og floyta og froysa. Meðan tú bara ert burtur í onkrum.

Tú ert nevniliga vaknaður og vorðin varugur við, at tað at ferðast skal kennast sum ein fragd frá fyrstu føløtu. Og samstundis, sum tú fært frið at fara, verður tú borin millum bygda á stórum og tryggum hjólum. Eisini úr oyggj í oyggj undir sundi.

Kostnaðurin er hin sami sum áður, hóast tænastan er vorðin nógv betri. Leiðin er munandi stytt, og framvegis fer nýtt starvsfólk at hjálpa ferðandi við viðførinum.

Hví bakast í bili? Nýtið bussin!

BYGDALEIÐIR
STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo · 34 30 30




# Jólaskipið til Klaksvíkar

**Eins og undanfarin ár kemur jólaskipið á Klaksvík við fult av jólamonnum umborð. Skipið verður í Klaksvík fríggjakvøldið um sekstíðina**

JÓLASKIP
*Solby A. Eliasen*



*Tá jólamenninir eru komnir á land, verður marsjerað niðan í mentunarhúsið Atlantis, har tiltakið heldur fram*

*Mynd: Norðlýsið*

**Klaksvík:** Fyrireikararnir siga tó, at veðrið spælir ein stóran leiklut. So um tað ikki viðrar, so verður tiltakið helst útsett. Men sum er kemur jólaskipið til Klaksvíkar fríggjadagin klokkan seks.

Sum nakað nýtt ætla fyrireikararnir hesaferð at jólamenninir skulu koma í land á vestaru bryggju við nýggja Kryvjivirkið. Hetta verður gjørt, tí mett verður, at fólki á henda hátt betur kunna síggja skipið. Undanfarin ár eru jólamenninir komnir á land við Sandin. Men skipið kann ikki sigla so nær landið har, tí tað er so grunt. Síðani verður marsjerað, við hornorkestrinum og nissum á hestbaki á odda, niðan til mentunarhúsið Atlantis, har tiltakið heldur fram.

Tað eru nú 11 ár síðani jólaskipið kom á Klaksvík fyrstu ferð, og tá var tiltakið munandi minni enn tað er í dag. Tá vóru ikki góðar tíðir í Føroyum, so fyrireikararnir tóku stig til tað fyri at skapa jólahugna millum fólk, hóast fíggjarliga kreppan herjaði um oyggjarnar. Tá var skipið nógv minni enn tað er í dag og tað vóru heldur ikki so nógvir jólamenn. Tiltakið, sum er eitt vælgerandi endamál við tí fyri eyga at gleða børnini, verður stuðlað av virkjum og fyritøkum í Klaksvík. Men líka síðani fyrstu ferð hava fyrireikararnir verðið niðurkimaðir av fólki, tá tað nærkast jólum, sum vilja fregnast, nær jólaskipið kemur.

Og nógv fólk plaga at taka ímóti. Tað sæst best á talinum av pakkum, sum plaga at verða býttir út. Umleið 1.500 pakkar. Og um so ein vaksin er við hvørjum barni, so er lætt at rokna út, hvussu nógv fólk talan er um. Øll árini hevur veðrið verið gott, tá jólaskipið er komið, og tað hevur sjálvandi eisini gjørt sítt til at so mong fólk plaga at taka ímóti.

# Málningaframsýning

**Í hesum døgum sýnir Maria Mørkøre fram málningar í hølunum hjá Karl Nielsen í Klaksvík**

MÁLNINGA-FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*



*Maria Mørkøre hevur málningaframsýning í hølunum hjá Karl Nielsen í Nólsoyar Pálsgøtu. Tað eru í sama bygningi, sum redaktiónin hjá Sosialinum heldur til*

**Klaksvík:** Talan er um olju og akryl málningar av bygdaløgum. Men onkur er eisini av fólkum.

Maria hevur altíð teknað, men tað var ikki fyrr enn í 1996, tá hon byrjaði at kunstskúla í Danmark, at áhugin fyri at mála rættiliga gjørdi vart við seg. Síðani tá hevur hon málað nógv. Hon roynir at liva av tí, men samstundis er tað ójavnt, hvussu nógv hon málar.

Fólk kunna koma inn at síggja málningarnar í skrivstovutíð. Tað vil siga frá klokkan 9 til 16. Og eisini verður opið sunnudagin frá klokkan 16 til 20.

### Ongi høli

Hølini, har Maria hevur sínar málningar er bert eitt av teimum mongu hølunum, sum verða nýtt til framsýningar. Men verulig listahøli til slík endamál í Klaksvík. Tað er nakað sum leikin er, at tað eru ongi listafólk í Klaksvík sakna, tí tað hevði verið betur, um eitt serstakt høli var til slíkar framsýningar.

Bernhardina Klein, formaður í Norðoya Listafelag sigur, at felagið arbeiðir við at fáa eini høli til slík endamál. Hon sigur, at tey arbeiða við at fáa eini hús bygt til felagið.

– Men tað er eitt sera tungt tak at fara í holt við. Tað eru bara ongi hóskandi høli til okkara virksemi her í Klaksvík, og tað harmast vit um, sigur Bernhardina.

Allar ognirnar hjá Norðoya Listafelag standa sum er goymd í einum rúmi í Býráðshúsinum, og verða tey mest sum bert tikin fram til framsýningarnar á Norðoyastevnu, sum plaga at vera í skúlunum.

Bernhardina veit at siga, at tað einaferð var talan um hjá býráðnum at byggja okkurt, og har var so Listafelagið ein partur av tí ætlanini, men hon hevur síðani ikki hoyrt so nógv annað, enn at ætlanin er slept aftur. Og tað harmast hon um, og sigur, at so er ikki so nógv annað hjá Listafelagnum at gera enn at halda fram við teirra arbeiði við málinum.

Bernhardina sigur, at eini tílík høli helst verða dýr at byggja, tí tey mugu ikki verða ov lítil, og so skulu tey eisini verða bygd so, at tey eru egnað til endamálið.

- Vit arbeiða sjálvandi allatíðina við tí, men tað er ikki so lætt, sigur Bernhardina at enda.